Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Viðurkenning av Palestina

Spurningar:

1. Hvat bygdi løgmaður pástandin á, tá hann á tingfundi tann 15. mai í ár segði, at Danmark, vikuna undan, hevði viðurkent Palestina sum ríki?
2. Hevur landsstýrið nakrantíð á landsstýrisfundi viðgjørt spurningin, um Føroyar skulu viðurkenna Palestina sum sjálvstøðugt ríki?
3. Hvussu eru mannagongdirnar í sambandi við slíkar viðurkenningar?
4. Eru øll almenn úttalilsi frá landsstýrismanninum við uttanríkismálum at rokna sum ein fráboðan um almenna politikk Føroya?
5. Um ikki øll almenn úttalilsi frá landsstýrismanninum við uttanríkismálum eru at rokna sum ein fráboðan um almenna politikk Føroya, hvussu verður so skilt ímillum, nær talan er um almenna politikk Føroya, og nær talan ikki er um almenna politikk Føroya?

Viðmerkingar:

Tann 15. mai í ár svaraði løgmaður einum munnligum fyrispurningi í Løgtinginum frá undirritaða, MS-123/2023, har hann segði soleiðis: “Hóast Palestina ikki enn er limur í ST, hava 143 lond, herundir Danmark, so seint sum í seinastu viku, viðurkent Palestina sum ríki.”

Men tann 22. mai stóð ein grein á heimasíðuni hjá Danmarks Radio, har yvirskriftin var: “Regeringen er ikke klar til at anerkende Palæstina som stat”. Í greinini verður Lars Løkke Rasmussen, uttanríkisráðharri, endurgivin fyri at siga: “Hvis Palæstina skal anerkendes som stat, kræver det, at staten findes.”

Men løgmaður segði í Løgtinginum eina viku undan hesum, at Danmark hevði longu viðurkent Palestina sum ríki. Hetta segði hann í svari til ein fyrispurning, har spurt varð, hvør hevði tikið avgerðina um, at Føroyar stuðla eini tvíríkjaloysn, soleiðis at Ísrael og Palestina verða at rokna sum tvey sjálvstøðug ríki.

Løgmaður svaraði tí spurninginum við at siga, at í fráboðan tann 18. desember 2023 segði landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, at fortreytin fyri friði er ein loysn við tveimum ríkjum, og at hetta síðani varð endurtikið í Løgtinginum og í almenna rúminum. Svarið kundi illa skiljast øðrvísi enn, at orðini hjá landsstýrismanninum vóru bæði støðutakanin og almenna fráboðanin vegna Føroyar. Løgmaður bleiv beinleiðis spurdur, hvør hevði tikið avgerðina, og nær hon varð tikin, og hann vísti í svarinum bara til hetta. Tí verður í hesum fyrispurninginum spurt, hvussu mannagongdirnar eru í sambandi við slík mál.

Á Løgtingi, 28. mai 2024

Helgi Abrahamsen